Stovna fiskivinnuráð

Í inngangínum til samgonguskjalið, sum er grundarlagið undir landsstýrissamvinnuni millum javnaðarflokkin, tjóðveldisflokkin og fólkaflokkin, verður sagt, at ein meginsetningur hjá samgonguni er at inna í verki tey stórmál, sum støðið varð lagt undir í farna landsstýrisskeiðinum.

Her er talan um fólka- og framhaldsskúlalóg, skúlafyrisiting, landsbanka, íbúðarmál, skattamál, dagpeningaskipan og landbúnaðarútbúgving.

Samgongan vil eisini miða ímóti at tarna og vinna á inflatiónsvøkstrinum. Hon vil sýna størsta varsemi í almennu peninganýtsluni og lætta um skattabyrðarnar hjá teimum inntøkuveiku.

Eisini verður sagt, at øllum stættum verður vissað rímuligan part av tjóðarinntøkuni og at vinnulívsútbúgvingin hevur til endamáls at tryggja arbeiði til allar hendur.

Ráðgevandi fiskivinnuráð

Undir táttinum fiskivinna verður m.a. sagt, at eitt fiskivinnuráð skal skipast við umboðum fyri vinnuna. Fiskivinnuráðið skal vera leiðbeinandi og ráðleggjandi í spurningum um veiðuhættir, skipasløg, studningslóggávu, sínámillum veiðurættindi og annars í øllum øðrum fiskivinnumálum.

Eisini verður sagt, at dentur skal leggjast á at virka veiðuna á slíkan hátt, at hon fær størst møguligt søluvirði, samstundis sum hon gevur mest møguligt arbeiði.

Fyri at útvega allar upplýsingar um rækt og møguliga nýtslu av fiskiríkidøminum, skal hóskiligt fiskirannsóknarskip útvegast.

Dent á bygdarmenningarpolitikk

Sambært tí nýggja samgonguskjalinum fer landsstýrið at leggja dent á at føra ein miðvísan bygdamenningarpolitikk. Endamálið er fyrst og fremst at tryggja arbeiði á staðnum til allar vinnuførar hendur fyri at bøta um trivnaðarviðurskiftini.

Í hesum føri er ætlanin at økja um íðnaðarútbyggingina og landbúnaðarframleiðsluna. Eisini skal virkast fyri øktum heima- og smáíðnaði. Í samband við bygdamenningarpolitikkin verður sagt, at har tað privata fyritakssemi ikki røkkur, kunnu kommunur og landið ganga á odda í hesi útbygging.

Medávirkan

— Verður almennur eginpeningur settur í vinnufyritøkur, skal almenn ávirkanin samsvara hesum, tó so at fólkið á staðnum hevur rímuliga medávirkan.

— Virki, sum hava serligan arbeiðsskapandi týdning, mugu ikki steðga vegna figgjar- ella aðrar kreppur. Landsstýrið fær heimild til at skipa fyri, at raksturin heldur fram, meðan orsøkirnar til trupulleikarnar og framtíðarmøguleikarnar verða kannaðir, verður m.a. sagt um bygdamenning og íðnað.

Viðvíkjandi skipabygging verður sagt, at hava skipasmiðjur ongar sáttmálar, kann landsstýrið skipa fyri sáttmálum um byggjan av hóskandi skipum. Við serligum veðhalds- og figgjarskipanum skal farmaskipabyggingin stuðlast.

Undir handilsmálum er landsstýrið sinnað at stuðla kooperativum samtøkum innan innflutning av byggitilfari og skipaútgerð við íløgustuðli ella almennum veðhaldum.

Somuleiðis er landsstýrið sinnað at stuðla tiltøkum, sum miða ímóti nýggjum og fjølbroyttum útflutningsmøguleikum.

Neyðugt við nýdyrking

Um landbúnað ásannar samgongan, at tað er neyðugt at fremja munandi nýdyrking, um búnaðarframleiðslan skal økjast av álvara. Hvussu nógv skal nýdyrkast í komandi fýra ára skeiði, skal tað almenna saman við vinnuni finna út av.

Í samgonguskjalinum verður mælt til, at øll, sum hava áhuga fyri landbúnaði, fáa møguleika at búgva seg út innan hesa vinnu og gera nýtslu av hesi útbúgving. Tí skal øll búnaðarjørð vera í nýtslu.

Annars verður sagt, at ein nevnd skal viðgera øll viðurskifti innan føroyskan landbúnað. Eisini skal samvinnan millum almennu umsitingina og jarðarráðið nýskipast.

Lánigrunnarnir víðkast

Undir búskapar- og figgjarmálum verður ásannað, at tað er tørvur á lagaligum figgingarmøguleikum. Her verður serliga hugsað um figging til íðnaðarútbyggingar. Tí mælir samgongan til at víðka um virkismøguleikarnar hjá núverandi lánigrunnunum.

Um lønarpolitikk verður sagt, at ein politikkur skal rekast, sum minkar um lønarmunin. Annars vil landsstýrið halda á við at samskipa tey ymisku almennu lønarløgini.

Viðvíkjandi skattamálum skal virkast fyri samtíðarskatting (kelduskatti) skjótast gjørligt.

Eisini verður sagt, at avskrivingin eigur at koma vinnuni meira til góðar heldur enn at økja um eginnýtsluna.

Endamálið við íbúðarpolitikkinum er at skipa fyri at øll fólk kunnu fáa egin hús ella íbúð og sita við teimum. Hetta verður gjørt sambært ta lóggávu, sum varð gjørd í undanfana skeiði.

Viðvíkjandi grundstykkjaprísinum vil tað almenna virka fyri øktum útboði av byggilendi og reka ein miðvísan byggibúningarpolitikk og fremja býarplanlegging. Eisini skal kollegiubygging stuðlast.

Endurútbúgvingarstovnur

Sum nakað nýtt undir almannamálum skal ein endurútbúgvingarstovnur skipast. Stovnurin skal samskipa endurútbúgvingina bæði á størri og smærri plássum. Hann skal eisini útvega brekandi hóskandi arbeiðspláss.

Annars skal ein arbeiðsloysistrygging fyrireikast.

Um pensionistar verður sagt, at hesir kunnu vinna sær størri arbeiðsinntøkur uttan at útgoldna peningaupphæddin verður skerd.

Eitt serligt brot er um familju-, trivnaðar- og umhvørvismál. Her verður m.a. sagt, at virkast skal fyri javnrættindum millum kynini.

Rúsdrekkalógin skal endurskoðast og virkast skal fyri at minka um rúsdrekkanýtsluna. Eisini skal ein politikkur rekast, sum minkar um tubbaksnýtsluna.

— Tann skjóta útbyggingin á sjógvi og landi krevur at miðvísur umhvørvispolitikkur verður lagdur.

M.a. verða árinakanningar at gera í samband við komandi útbyggingar. Virkað verður við lóggávu fyri at fyribyrgja dálking av havinum og á landi, verður sagt um umhvørvisspurningar í samgonguskjalinum.

Ungdóms- og frítíðarlóggáva

Undir skúla- og mentanarmál hevur samgongan ætlan um at gera eina ungdóms- og frítíðarlóggávu, sum hóskar til føroyska samfelagið, og sum hevur til endamáls at geva fólkinum bestu umstøður at nýta sína frítíð á ein mennandi hátt.

Um list verður sagt, at betur umstøður skulu tryggjast skaldskapi, tónleiki og sjónleiki.

Viðvíkjandi samferðslumálum verður strandferðslan samskipað og útbygd. Tænastan hja postverkinum, telefonverkinum og strandferðsluni verður samarbeidd og effektiviserað. Eisini verður tryggjað, at føroyingar fara undir at reka millumlandaflúgving og hava helmingin í egnum hondum.

Miðvísur kommunalpolitikkur

Viðvíkjandi kommunuviðurskiftum skal ein kommunalur útjavningargrunnur setast á stovn sum lið í bygdarmenningarpolitikkinum.

Eisini skal landið stuðla stovnseting av einum kommunalum lánigrunni, sum í virki sínum skal tryggja, at minni gjaldsorka hjá kommunum ikki forðar teimum í at nýta hendan grunn.

Eisini verður miðað ímóti, at studningurin úr landskassanum til kommunurnar og gjøldini frá kommunum til tað almenna verða umløgd við tí fyri eyga at gera umsitingina einfaldari.

Seinast í samgonguskjalinum, sum er í 17 b rotum, verður undir uttanríkismálum sagt, at samgongan vil virka fyri, at samtyktin frá 19. august 1970 um hernaðarligar samgongur verður framd. (Samtyktin snýr seg um Nato-støðina).

Landsstýrið vil framvegis arbeiða fyri javnbjóðis umboðan í Norðurlandaráðnum. Í øllum uttanríkismálum, sum viðvíkja Føroyum, luttaka føroyingar sjálvir í samráðingunum teimum viðvíkjandi og í viðgerð teirra og leiða slíkar samráðingar, verður sagt at enda í samgonguskjalinum, sum var almannakunngjørt, tá landsstýrið varð valt eins og fyri fýra árum síðani.

kring oyggjarnar

Tór fær góða undirtøku

Uttan iva einasta emballaguvirki í Føroyum, Tór í Vestmanna, hevur gott eitt ár á baki. Teir byrjaðu framleiðsluna um 1. november í 1977 og hava síðani framleitt ymsa emballagu úr plastikki fyri knappar tvær mill. kr.

Á Tór arbeiða í løtuni 5 fólk, men um summarið, tá nógv er at gera, er arbeiði til 7 fólk. Virkið hevur leigað seg inn í hølini hjá Atlantic Pane.

Úr Vestmanna frættist, at tað hevur gingið væl betur at sleppa av við føroysku emballaguna, enn teir høvdu roknað við, tá virkið byrjaði framleiðsluna. Tað vísir seg, at føroyingar eru hugaðir at keypa føroyska framleiðslu heldur enn útlendska. Á virkinum meta teir seg eisini at vera kappingarførar við innflutta emballagu bæði hvat viðvíkur prísi og dygd.

Tørvurin á tílíkari emballagu, sum verður framleitt á virkinum, tað eru bæði beriposar, frystiposar, sekkir o. a., er rættiliga stórur í Føroyum. Í dag keypa nærum allar heilsølur frá plastvirkinum Tór, og ein stórur avtakari er Føroya Fiskasøla, sum keypir hópin av sonevndum plastørkum, ið verða nýtt í fiskaútflutninginum til USA.

Rávøran er tilfarið polyethylen, sum verður keypt í Danmark. Ein tann størsti meinbogin hjá einum tílíkum íðnaði í Føroyum er tann, at tilfarið til lidnu posarnar verður prentað í Danmark. Filmirnir verða síðani sendir til Føroya, og her verða teir gjørdir til og sveisaðir saman.

Tað hevði verið ynskiligt, at vit høvdu eina maskinu at gera filmirnar við sjálvir, men hon er heldur kostnaðarmikil. Ein tílík maskina til fimm litir kostar góðar triggjar milál. kr.

Á Tór siga teir, at umstøðurnar eru ikki alt ov góðar, og at tað hevði verið ynskiligt at havt eini størri hús. Hetta liggur tó nakað frammi í tíðini.

Íløgurnar í virkið hava verið knappa mill. kr. Áðrenn teir byrjaðu høvdu teir roknað við, at tað fór at mala runt 1. árið, 2. árið fór nakað til avskrivingar og 3. árið varð komið í eina fasta legu. Tað hevur kortini gingið betur enn væntað. 1. árið er eisini nakað til avskrivingar.

Altjóða barnalegan verður á Sandi

Altjóða barnalegan, sum Føroyadeild CISV skipar fyri í summar, verður á Meginskúlanum á Sandi. Legan verður í døgunum 1.—25. juli og umframt fimm føroyingar koma børn úr 9 londum, m.a. so fjarskotnum sum Costa-Rica og Filipsoyggjunum. Fýra børn koma úr hvørjum landi, tvær gentur og tveir dreingir, og við teimum eitt vaksið fólk, sum er leiðari og eisini tolkur, tá á stendur. Føroyadeild CISV eitur Altjóða Barnalegur og hon varð stovnað fyri tveimum vikum síðani. Tá var ein nevndarlimur í norsku deildini, Ketil Lehland, í Føroyum og var hann eisini á Sandi og hugdi at Meginskúlanum.

Luttakararnir skula búgva á Meginskúlanum, men tey fara eisini at gera ferðir til hinar oyggjarnar.

Frá barnaleguni við Koppang í Noregi í fjør, har fimm føroyingar luttóku.